→

mappu við skjølum frá Bergur Wardum um dupultsøluna og tey rættarmál hann hevur verið í gjøgnum síðan. Eg kendi tey flestu av hesum skjølum, men okkurt er nýtt kortini. Eg havi lisið hesi skjøl gjølla í gjøgnum og eg dugi ongastaði í hesum skjølum at síggja, at grundarlag hevur verið fyri skrivingini í Oyggjatíðindi móti mær.

### Svárt fyri meg og mína familju

Dan Klein er í ákæruritinum kravdur at rinda fyri tort.

– Hetta tíðarskeið hevur verið svárt fyri meg og mína familju. Kanska serliga aftaná at dómurin viðvíkjandi Oyggjatíðindi og Tommy Petersen varð tikin aftur av landsrættinum. Oyggjatíðindi slóð hetta stórt upp og Dan Klein fekk eisini góðan møguleika í sjónvarpinum at svína mín persón til?

Hvussu stóra bót skal blaðstjórin fáa? spurdi ákærin.

– Tað lati eg trygt uppí hendurnar á rættinum at meta um, segði Joen H. Andreasen.

### Dómsviðgerðin

Ákærin Michael Boelsen krevur blaðsjóran í Oyggjatíðindum dømdan eftir grein 267 og 268 í revsilógini. Grein 267 kann geva upp til sseks mánaðar fongsul. Grein 268 sum snýr seg um útspilling kann geva upp til tvey ára fongsul.

Verjin, Søren Søltoft Madsen kravdi blaðstjóran frídømdan, serliga tí handlað í góðari trúgv. Í øðrum lagi at blaðstjóri varð dømdur linastu revsing og grein 268 helt hann alt ikki kundi koma uppá tal.

Dómur fall um fýra tíðina í gjár, men tá var blaðið longu farið til prentingar og tí kunnu vit av góðum grundum ikki hava nakað um dómin í blaðnum í dag.

*Lesið meira á síðu 6*



*Dómarin. Joen H. Andreassen segði í rættinum, at seinasta tíðin hevði verið ring fyri hann og hansara familju. Skuldsetingarnar í Oyggjatíðindi sáðaðu íva um hansara persón. Seinnapartin í gjár var stórur spenningum um hvønn vegin dómurin fór at bera. Dómurin fall klokkan 16:00 og vit fara at greiða frá honum í blaðnum í morgin*

*Marita Petersen, løgmaður:*

# Oljuvinna kærkomin men fiskivinnan framvegis høvuðsvinnan

*-Tað er ógvuliga umráðandi, at vit ikki leypa fram av, men at vit finna dygdar- og skilagóðar loysnir*

Hetta sigur Marita Petersen, sum umsitur undirgrundarmál í Tinganesi í sambandi við, at freistin at bjóða upp á kanningar av føroysku undirgrundini var úti mánadagin.

Løgmaður heldur, at landsstýrið hevur borið seg rætt at í hesum stóra máli. Tað hevur gingið skjótt, og teir, sum hava arbeitt við málinum, hava latið dygdargott arbeiði úr hondum.

### Fiskivinnan høvuðsvinnan

Upp á fyrispurning um hon ynskir eina oljuvinnu í Føroyum, sigur løgmaður at vit eiga at kanna, hvat finst í undirgrundini. Er olja og gass har, so eiga vit at menna eina vinnu á økinum.

Løgmaður vísir tó til tær samtyktir, sum eru gjørdar í tinginum, har stórur dentur verður lagdur á at fáa ta røttu lóggávuna upp á pláss eitt nú í sambandi við at verja umhvørvið og harvið fiskastovnarnar.

-Hóast vit fáa eina oljuvinnu, so verður fiskivinnan framhaldandi okkara høvuðsvinna og tað, ið vit skulu byggja okkara framtíð á. Aðrar vinnugreinar, sum kunnu vera eitt ískoyti til samfelagsbúskapin, eru kærkomnar sigur Marita Petersen, sum er spent um, hvussu fer at gangast við komandi forkanningunum av føroysku undirgrundini.

jan



*Marita Petersen, løgmaður umsitur eisini undirgrundarmál í Tinganesi. Hon er sera væl nøgd við arbeiði hjá føroysku oljuráðleggingarnevndini og ráðgevum tess*

Til BLAÐSØLURNAR
sosialurin aftur ÚTSELDUR?
Boðið so beinanvegin frá á tlf. 11820.
Uttanfyri vanliga arbeiðstíð upplýsir telefonsvararin hvar ringjast skal fyri at fáa fleiri bløð.
Tíðindablaðið SOSIALURIN

## VALUTAKURSIR

| | | 22.02.94 | Ultimo síðsta mán. |
|---|---|---|---|
| *USA* | Dollari | 676,50 | 675, 75 |
| *Bretland* | Pund | 997,84 | 1012, 14 |
| *Týskland* | Markur | 390,54 | 388, 14 |
| *Svøríki* | Króna | 85,02 | 85, 09 |
| *Noreg* | Króna | 90,33 | 90, 29 |
| *Frakland* | Frankur | 114,92 | 114, 28 |
| *Belgia* | Frankur | 18,968 | 18, 804 |
| *Sveits* | Frankur | 464,41 | 460, 95 |
| *Holland* | Gyllin | 348,03 | 346, 547- |
| *Italia* | Liri | 0,4026 | 0, 3975 |
| *Finnland* | Markur | 122,05 | 121, 07 |
| *Ísland* | Króna | 9,28 | 9, 25 |
| *Eysturríki* | Skillingur | 55,537 | 55, 213 |
| *Spania* | Pesetas | 4,800 | 4, 801 |
| *Portugal* | Escudos | 3,854 | 3, 856 |
| *Kanada* | Dollari | 503,39 | 511, 08 |
| *Japan* | Yen | 6,4111 | 6, 1905 |
| *Írland* | Pund | 957,92 | 971, 12 |
| *Grikkaland* | Drakmur | 2,700 | 2, 701 |

Kelda: Føroya Sparikassi